Vinir Ísraels:

# Aðalfund og fyrilestur

**Edvard Joensen, blaðmaður, fer at hugleiða um Ísrael á aðalfundinum hjá felagnum »Vinir Ísraels« í morgin**

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Felagið »Vinir Ísraels í Føroyum« hevur ársaðalfund komandi leygardag, 20. mars kl. 17.00. Fundurin verður á Sernámsdeplinum, Frælsið 32, í Havn. Nýggir limir kunnu tekna seg á fundinum.

Aftaná vanliga aðalfundin, fer Edvard S. Joensen, blaðmaður, at bera fram nakrar hugleiðingar úr Ísrael. Edvard, sum er søgu- og bíbliukønur, var saman við formanni felagsins, Dánjali Poulsen, á rundferð í Ísrael fyrr í vetur og hevur skrivað eina røð av áhugaverdum greinum um Ísrael í Sosialinum.

Sum tey flestu vita, so røkkur søga Ísraels, sum er sera væl dokumenterað, fleiri túsund ár aftur í tíðina, og neyvan hevur nakað land í heiminum so umfatandi og áhugaverda søgu sum júst Ísrael; eitt land sum hevur borið so nógv gott til mannaættina, men sum tíverri mangan eisini hevur verið fjøtrað av ófriði, kríggi og yvirgangi, sum enn dagin ídag heldur landinum á ovastu rók í altjóða fjølmiðlaheiminum.

Samstundis er hetta lítla landið og jødafólkið so avbera hugtakandi og spennandi fyri tann sum kennir eitt sindur til søguna og umstøðurnar sum tey virka undir í dag, so óynskt í heimsparti sínum.

Felagið »Vinir Ísraels í Føroyum« virkar fyri at fáa føroyingar at stuðla Ísrael á allan hátt, har vit eru før fyri tí.

Øll eru vælkomin at hoyra hugleiðingarnar hjá Edvardi S. Joensen, sum fær orðið kl. 18.00.



*Aftan á vanliga aðalfundin, fer Edvard í Skorðini Joensen, blaðmaður, at bera fram nakrar hugleiðingar úr Ísrael. Edvard, sum er søgu- og bíbliukønur, var saman við formanni felagsins, Dánjali Poulsen, á rundferð í Ísrael fyrr í vetur og hevur skrivað eina røð av áhugaverdum greinum um Ísrael í Sosialinum*




# Kvinnan framvegis eftirlýst

**- Vit hava bara tær keldur at halda okkum til, sum siga seg hava sæð kvinnuna á veg niður til Danmarkar og í lufthavnini í Billund, 11. mars, sigur løgreglan**

EFTIRLÝSING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Herfyri var lýsing í Útvarpi Føroya, har løgreglan eftirlýsti einari 34 ára gamlari kvinnu, sum tá hevði verið saknað nakrar dagar. Seinni sama kvøldið, sum eftirlýsingin fyrr um dagin var í ÚF, var leitingin avblást, tí kvinnan skuldi vera komin afturíaftur í øllum góðum. Men, sum dagarnir ganga – og umleið ein vika er liðin, síðan kvinnan læt frætta frá sær, frættist millum fólk, at unga kvinnan kortini ikki er komin afturíaftur.

Sosialurin hevur vent sær til løgregluna og spurt, hvussu hetta hongur saman.

- Eftir at vit eftirlýstu kvinnuna í Føroyum, fingu vit fráboðan frá fólki, sum kenna hana og søgdu seg hava sæð hana í Billund um hetta mundið. Tí avgjørdu foreldrini í fyrstu syfti at avlýsa eftirlýsingina.

Løgreglan sigur, at sum dagarnir eru gingnir, og kvinnan ikki hevur sett seg í samband við familjuna, er eftirlýsingin tikin uppaftur í Danmark, samstundis sum fylgt verður við, um kvinnan skuldi komið heimaftur til Føroya.

– Vit hava bara tær keldur at halda okkum til, sum siga seg hava sæð kvinnuna á veg niður til Danmarkar og í lufthavnini í Billund, 11. mars.

Løgreglan sigur, at kvinnan er farin til Danmarkar undir øðrum navni.

– Við tað, at kvinnan ikki hevur vent sær til okkara og ei heldur hevur vent sær til familjuna, er hon framvegis eftirlýst í Danmark. Familjan vil sjálvsagt fegin hava samband við kvinnuna, sigur løgreglan, sum fylgir við, hvussu gongst við leitingini í Danmark.

Fólk, sum vita um ungu kvinnuna at siga, eru vælkomin at venda sær til løgregluna.






Ráðið fyri Ferðslutrygd:

# Kanna sær íblástur úr Danmark

**Ráðið fyri Ferðslutrygd er júst heimkomið frá kunningartúri í Danmark, har tey hava fingið íblástur til átøk í sambandi við, at Nullhugsjónin skal til aðalorðaskifti í løgtinginum**

FERÐSLUTRYGD
*Ingrid Bjarnstein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**Danmark, Galten:** Við slagorðinum "Lad hjertet banke, kør´ med omtanke" ferðast Børge Jensen land og ríkið runt við fyrilestrum um ferðslutrygd. Og var tað júst hesin fyrilestur, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd úr Føroyum hevði stóran áhuga fyri.

- Okkum vantar kunning til tey eldru. Tað vil siga til teirra, ið eru farin úr fólkaskúlanum og undir víðari útbúgving á eitt nú studentaskúlum, sigur Rúna Sivertsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Í 2001 tók Børge Jensen av sínum eintingum stig til at ferðast runt í Danmark at halda fyrilestrar um ferðslu. Hetta komst av, at í eini lítlari kommunu á Fjóni, doyðu seks ung millum 15 og 24 í einum tíðarskeiði á 14 mánaðir. Tær syrgiligu vanlukkurnar høvdu við sær, at Børge helt tað verða alneyðugt við upplýsing um koyring hjá ungum og ikki minst ferð.



*Børge Jensen ferðast av sínum eintingum runt í Danmark at halda fyrilestrar um ferðslu. Hetta komst av, at í eini lítlari kommunu á Fjóni, doyðu seks ung millum 15 og 24 í einum tíðarskeiði á 14 mánaðir*

## Køn fólk við

Børge Jensen er ikki einsamallur um fyrilestrarnar. Afturat sær hevur hann eitt pallborð av kønum fólkum, sum eru við, tá eitt ferðsluóhapp hendir. Talan er um løgreglu, portør, lækna og sjúkrasystir. Umframt hesi hevur hann eisini jarðarferðarmann og prest.

Orsøkin til, at Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur valt at síggja og hoyra nærri frá júst hesum tiltakinum er, at tey ynsktu at síggja, hvussu hetta fór fram, og ikki minst til fáa íblástur til okkurt líknandi tiltak heima í Føroyum.



*Tiltakið byrjaði við eini mynda-,ljós- og ljóðrøð. Síðani fingu pallborðsluttakararnir orðið at greiða stutt frá teirra arbeiði, og harafturat tóku tey einstøk dømi um ferðsluóhapp ella vanlukkur, tey mintust serliga væl*

Tiltakið varð skipað soleiðis, at tað byrjaði við eini mynda-, ljós- og ljóðrøð. Síðani fingu pallborðsluttakararnir orðið at greiða stutt frá teirra arbeiði, og harafturat tóku tey einstøk dømi um ferðsluóhapp ella vanlukkur, ið tey mintust serliga væl.

– Eg skipi fyri hesum tiltakinum, tí tey ungu vita ikki, hvørjar kreftir tey hava millum hendurnar tá tey seta seg handan róðrið, greiðir Børge Jensen frá. Hann metir, at millum 11 og 13.000 danir hava luttikið á tiltakinum, sum fyrstu ferð sá dagsins ljós fyri trimum árum síðani.

## Átøk í gongd

Við á ferðini hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd vóru Rúna Sivertsen, formaður, Jón Kragesteen, dagligur leiðari og Høgni í Stórustovu, starvsnevndarlimur.

Tey lótu væl at eftir tiltakið, og sambært teimum, skuldi tað latið seg gjørt at stáplað eitt tílíkt tiltak uppá beinini í Føroyum.

Null-hugsjónin sum sigur, at ongin skal fáa álvarsligan skaða ella lata lív í ferðsluni hevur fyri stuttum verið fyri á landsstýrisfundi. Og um heilt stutta tíð skal hugsjónin til aðalorðaskifti í tinginum.

Í hesum sambandi fer Ráðið fyri Ferðslutrygd undir ymisk átøk. Millum annað er talan um kunningarfaldarar smáfilmar og lýsingarátøk.

– Tað er alneyðugt at broyta hugburðin hjá fólki í ferðsluni. Eitt nú roykingarherferðirnar hava gjørt so góðan mun, at tað í dag er skomm at plága onnur við royki. Men tað er framvegis ikki skomm til dømis at koyra við børnum framman í bilinum, sigur Rúna Sivertsen.

Ráðið fyri Ferðslutrygd ásannar, at alstórur tørvur er á kunning til tey, ið júst hava fingið ella eru við at taka koyrikortið. Og eitt slíkt tiltak átti at økt um tilvitskuna hjá nýklaktu ella komandi bilførarunum.

Á næsta fundi verður restin av ráðnum kunnað um tiltakið í Galten, og síðani verður tikin støða til, hvørt hetta verður til nakað í Føroyum. Men tey trý frá ráðnum, ið vóru við í Galten mánakvøldið, eru ikki í iva um, at tað avgjørt eigur at vera gjørligt at skipa fyri onkrum líknandi.




*– Eg skipi fyri hesum tiltakinum, tí tey ungu vita ikki, hvørjar kreftir tey hava millum hendurnar tá tey seta seg handan róðrið, greiðir Børge Jensen frá. Eini 11 og 13.000 danir hava luttikið á tiltakinum, sum fyrstu ferð sá dagsins ljós fyri trimum árum síðani.*

*F. v. Høgni í Stórustovu, starvsnevndarlimur, RFF, Jón Kragesteen, leiðari, RFF, Børge Jensen og Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*